Álit

í

løgtingsmáli nr. 95/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og í løgtingslóg um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum (Peningur til jarðfrøðiligar kanningar heldur enn umhvørvisárinsmetingar)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 21. mars 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 3. apríl 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Føroya Orkuídnaðarbólk, landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín D. Strøm, og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Uni Holm Johannesen, Annika Olsen og Karlot Hergeirsson) hevur hesar viðmerkingar:

Í sambandi við 3. og 4. útbjóðingarumfar eftir kolvetni á føroyska landgrunninum var ein treyt, at tey feløg, ið fingu leitiloyvi, skuldu gjalda eitt sokallað víddargjald.

Av hesum gjaldinum skuldu kr. 250,- fyri hvønn ferkilometur av øki oyramerkjast til at gera kravdar umhvørvisárinsmetingar av møguligum oljuvirksemi á landgrunninum.

Frá 3. og 4. útbjóðingarumfari standa í dag góðar 8,3 mió kr. á kontu til endamálið.

Endamálið við uppskotinum er at broyta endamálið fyri, hvat peningurin kann nýtast til, eftirsum onki kolvetnisvirksemi er á føroyska landgrunninum.

Ístaðin fyri, at peningurin verður nýttur til at gera kravdar umhvørvisárinsmetingar viðvíkjandi kolvetnisvirksemi, eigur peningurin heldur at verða nýttur til at gera jarðfrøðiligar kanningar í sambandi við grøna orkuskiftið.

Uppýst er fyri nevndini, at tað serliga verður hugsað um at gera kanningar av undirgrundini á landi, fyri at kortleggja heita vatnið í undirgrundini, fyri betur at kunna gagnnýta hetta tilfeingið í framtíðini.

Mett verður at tað er nóg mikið av orku í føroysku undirgrundini til at kunna nøkta allan tørvin hjá føroysku húsarhaldunum.

Tí heldur meirilutin, at tað er skilagott at brúka peningin til júst hetta endamálið, tí tað mest sannlíkt hevur eitt ómetaliga stórt virði fyri landið sum partur av framtíðar orkuskiftinum.

Jarðfeingi umsitur peningin og ger í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna av, hvussu peningurin verður nýttur.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Minnilutin tekur undir við meirilutanum og metir, at ætlaða brúkið av peninginum er skilagott. Tó heldur hesin minnilutin, at ein broyting eigur at verða gjørt í endamálsorðingini soleiðis, at heimildin verður víðkað.

Jarðfeingi fekk í sambandi við umsókn um nýtslu av tí sokallaða førleikapeninginum, sum er reguleraður við rundskrivi nr. 9002, dagfest 5. desember 2018, loyvi frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum at nýta hendan peningin til marknaðarføring av kolvetnisframleiðslu.

Nýtslan er í høvuðsheitum, at starvsfólk hjá Jarðfeingi halda persónligu kontaktirnar til feløgini við líka. Mest við at luttaka á messum og líknandi.

Fyrstu árini var loyvda brúkið av peningi 900.000 kr. pr. ár. Seinastu árini er loyvda peninganøgdin til hetta endamálið 450.000 kr. pr. ár.

Í nevnda rundskrivi stendur: ”Ultimo 2017 vóru innistandandi 4.990.284 DKK.”

Í samrøðu við Jarðfeingi hava vit fingið upplýst, at kontan primo 2024 er 688.885 kr. Tað við siga, at Jarðfeingi hevur pening til hetta virksemið í 2024 og til hálvt árið 2025.

Við tí aktivitetinum, sum nú nærkast føroyska markinum við risafetum, halda vit tað vera óheppið, um Jarðfeingi ikki kann halda áfram við hesum arbeiðnum.

Minnilutin setur tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1 verður § 7, stk. 4 í fylgiskjali B orðað soleiðis:
   “*Stk. 4.* Av gjaldinum verða 250 kr. fyri hvønn ferkilometur at nýta til kanningar í undirgrundini í sambandi við grøna orkuskiftið og marknaðarføring av kolvetnisframleiðslu. Jarðfeingi umsitur peningin og ger í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna av, hvussu peningurin verður nýttur.”

2. Í § 2 verður § 7, stk. 4 í skjali 2 orðað soleiðis:
   “*Stk. 4.* Av gjaldinum verða 250 kr. fyri hvønn ferkilometur at nýta til kanningar í undirgrundini í sambandi við grøna orkuskiftið og marknaðarføring av kolvetnisframleiðslu. Jarðfeingi umsitur peningin og ger í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna av, hvussu peningurin verður nýttur.”

Viðmerkingar:
Við hesum broytingum verður gjaldið víðkað til eisini at kunna fevna um marknaðarføring av kolvetnisframleiðslu. Jarðfeingi umsitur peningin, og ger í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna av, hvussu peningurin verður nýttur.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 17. apríl 2024

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstforkvinna	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	